

## BOTNLIÐ

*NSÍ'ararnir vóru ikki nóg kaldir, og nú er kalt í botninum*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# VODAFONEDEILDIN NSÍ hevði trý stig í pottinum, men seinastu løtuna gloymdu teir at koyra lokið á, og HB fór við øllum

Heri Simonsen

| | |
|---|---|
| HB | 2 |
| NSÍ | 1 |

HB og NSÍ hava mangan spælt betri uppgerðir sína millum, enn hana sum áskoðarnir upplivdu í kuldanum á ovara vølli í Gundadali ígjár. Tey fyrstu fimm korterini hendi ikki tað stóra, og sendingarnar sótu illa, og undirhaldsvirðið var í tí lægra endanum. Milan Culjic var spældur leysur av Andrew av Fløtum í fyrra hálvleiki, men hann misnýtti uppá tað skammiligasta. Annars høvdu liðini bert nakrar royndir úti frá í fyrra hálvleiki.

## Dramatikkurin kom

Nærum 5 korter vóru farin, áðrenn tað fór at bragda. Eftir eitt gott álop við nógvum sendingum, var bólturin lagdur inn fyri, har HB-málverjin, Símun Rógvi Hansen royndi at fanga bóltin. Hetta miseydnast og so fekk Christian Høgni Jacobsen fatur á bóltinum og skoraði til 1-0. HB spenti álopsbogan eftir hetta, og setti Hendrik Rubeksen inn fyri Rógva Holm, og tað skuldi vísa seg at verða ein klók avgerð. Vanliga leiktíðin var farin, tá Tór-Ingar Akselsen fekk bóltin í brotsteiginum, gjørdi eina skotfintu og smekkaði til. Andras Gango bjargaði, men Hendrik Rubbeksen fekk fótin á bóltin hjá málverjanum, og fekk prikað hann inn til 1-1. Hetta skelkaði NSÍ so mikið, at HB fekk gjørt sær dælt av hesum. Í teimum doyggjandi sekundunum fekk Andrew av Fløtum onkursvegna bóltin serveraðan fyri føturnar, og ísakalt sendi gamli málrevurin bóltin í netið, og NSÍ datt fullkomuliga úr barónasongini. Dysturin sum øll høvdu hug at gloyma, fekk ein minniligan enda.



*Enn hava Heðin á Lakjuni og NSÍ sín fyrsta sigur til góðar*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

## Sigurin kom væl við

Landsliðsspælarin, Símun Samuelsen viðgekk aftaná dystin uppi í bowlinghøllini, at sigurin kom væl við. – Høvdu vit tapt í dag, so hevði tað avgjørt ikki sæð so gott út. Men tað var fantastiskt, at tað eydnaðist. Tá vit javnaðu til 1-1 kendu vit á okkum, at áskoðarnir komu meira við, og ein fekk meiri blóð á tánna, og tað førdi so til, at vit fingu strítt okkum til tað seinna málið. Aftaná dystin var eingin ivi okkara millum, at talan var um tann stuttligasta sigurin, sum vit hava fingið í ár. Tað er ein ótrúlig kensla, tá ein næstan hevur tapt dystin, og so eydnast tað at vinna dystin við tveimum málum í yvirtíðini. Tað er ein ótrúlig kensla, segði ein sigurssælur Símun Samuelsen aftaná dystin. Tað loysir seg at arbeiða fyri sakini, ikki minst tá talan er um yvirtíð.

heris@sosialurin.fo